## DAGSINS MEINING

# Brúkaraumboðsmaðurin og Signar

Tveir menn skuldu saman fáa sær eitt brúkslán. Annar kannaði møguleikarnar og eftir eini viku fekk hann svar. Jú, lánið kundu teir fáa. Afturgjaldstíðin var 5 ár. Rentan var 12 prosent, men um lánið hevði veð í húsunum, kundi rentan verða 9 prosent. Hetta góðtók makkarin, sum er eitt sindur av einum almennum persóni, ikki. Hann setti seg í samband við fíggingarstovnin. Ein tíma seinri fekk hann svar: lánið kundi gjaldast aftur eftir 10 árum og rentan var 7 prosent.

Er hetta eitt mál, sum ein brúkaraumboðsmaður kann taka sær av? Neyvan. Men:

Maður og kona keyptu sær ein brúktan bil. Bilsølan segði, at bilurin var í góðum standi. Men tveir dagar seinri løgdu tey til merkis, at fleiri brek vóru við bilinum. Konan fór til bilsøluna, sum royndi at bera seg undan. Tá maðurin - eitt sindur frammi í almennum høpi - fór til bilsøluna, lat alt seg gera.

Hetta málið endaði væl, men hetta kundi enda sum eitt brúkaramál.

Grundgevingin hjá Signari á Brúnni og Tjóðveldisflokkinum fyri ikki at taka undir við uppskotinum um ein brúkaraumboðsmann og -stovn er m.a. hon, at landið er so lítið og at vit eru so nær knýtt - brúkarin og handilsmaðurin, bilsølan, sjónvarpshandilin, teldufyritøkan o.s.fr. Hann vísti á, at var okkurt galið, so bar altíð til at fara aftur, og fáa brekið rættað.

Eingin ivi um, at summi fólk, sum hava ein ella annan status í samfelagnum hava lættari við at fáa slíkt ígjøgnum enn maðurin/konan á gøtuni. Tað er umráðandi at gera sær henda veruleikan greitt.

Tí endar t.d. ein kendur politikari neyvan hjá brúkaraumboðsmanninum. Hvør vil ikki vera væl við ein politikkara? Ella stjóra? Ella onnur, sum eru nógv frammi.

Men er vanligi borgarin nóg erligur, ágangandi og hevur tað neyðuga dirvi, so gongur tað kanska. Hinvegin, hvussu ofta hoyra vit ikki um øll tey, sum ikki koma til sættis við handilsmannin? Um teldu- ella bilkeyp. Um keypssáttmálar. Við snikkaran um lekandi vindeygu. Við húsasmiðin um hús, sum trekkja ella tekjur, sum leka!

Kappingin er ein góður brúkarastovnur. Tað merkti føroyski brúkarin í kreppuni. Men hvussu er nú?

Skilligt, at tað harmar Hans Paula Strøm, at Tjóðveldisflokkurin ikki tók undir við uppskotinum um ein brúkaraumboðsmann. Flokkurin vil kortini hava ein umboðsmann. So er spurningurin: kunnu flokkarnir finna eina semju saman við Sambandsflokkinum, so vit fáa ein brúkaraumboðsmann, sjálvt um ein stovnur ikki verður settur á stovn?

Kann hetta virksemið leggjast undir kappingarráðið, ella sum ein sjálvstøðug deild undir Umboðsmanninum? Málið er - fyri føroyska brúkaran - í øllum førum ov gott at detta niður fyri. Tað snýr seg ikki um at mistonkja ella skapa handilsvinnuni trupulleikar. Tað snýr seg um at byggja upp eitt sínámillum álit, ið uppá sikt skal gagna bæði seljara og keypara.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

Eitt ár í býráðnum 4:

# Tilvild og mentan

**Jógvan Arge**
*býráðslimur í Havn fyri tjóðveldisflokkin*



Tá tú hevur eina mentamálanevnd í einum býráð, hugsar tú, at hetta borgar fyri einum væl viðgjørdum og skilagott tilevnaðum mentanarpolitikki. Men tað er ikki sjálvsagt.

Eftir eitt ár í mentamálanevndini hjá Tórshavnar Býráð má eg siga, at har verða sjáldan viðgjørdar tær stóru linjurnar í einum mentanarpolitikki fyri býin og kommununa. Heldur tvørturímóti.

Tá tað kemur til støðutakan til mentanarpolitisk mál, snýr tað seg ofta um at taka undir við (ella havna) umsóknum um at játta studning til tiltøk og ætlanir innan ymsar frítíðar- og listagreinir.

Slíkar umsóknir koma inn alt árið og verða í prinsippinum lagdar fyri nevndina tvær ferðir. Hon tekur so støðu og játtar tilsamans 425.00 krónur í smáum bitum.

Hesir bitar koma sjálvsagt væl við har, sum teir detta niður, og teir eru eisini tekin um, hvat kommunan vil stuðla.

Men hetta liggur fjart frá einum yvirskipaðum mentanarpolitikki, og er heldur ikki ein politikkur, sum ger hol í sjógvin.

Hesar 425.000 krónurnar eru umleið tíggjundaparturin av allari studningsjáttanini til mentamál. Hinar 4,3 mió kr. fara til árliga afturvendandi rakstrarjáttanir til feløg og stovnar.

### Mentanarálitið ikki viðgjørt

Í farna valskeiði lat kommunan gera eitt álit um mentanarpolitikk. Javnan verður tikið til hetta álit í mentanarkjakinum, men eg sakni eina breiðari viðgerð av tí og øðrum mentanarpolitiskum tonkum.

Eg skilji ikki, at álitið ikki er komið til gjølla viðgerð í nevndini og býráðnum, so møguleiki er at taka støðu og helst raðfesta, nær hesi ymsu tilmælini kunnu setast í verk.

Eitt mál burtur úr hesum áliti er, hvat Vaskaríið í Tórsgøtu skal brúkast til. Kommunan eigur tað, og býráðið hevur samtykt at biðja um ráðlegging um, hvussu hetta hús, sum er bygt í 1830unum, best verður varðveitt.

Mentanarálitið mælti til at gera allan niðasta part av Tórsgøtu til mentanargøtu og t.d. hava spælistað fyri yrkistónleikarar í Vaskarínum saman við matstovu ella skonkistovu.

Tað kann gott vera, at hetta er tað besta hugskotið, men til tess at koma til verulig úrslit, hugsi eg, at vit politikarar skuldu viðgjørt hesi málini meiri samskipað og undir einum, heldur enn at pilka einstøk hús og gøtur burtur úr og leggja allan dent á tey.

Er tað forrestin kommunan, sum skal gera matstøð og annað slíkt, og fæst eitt so gamalt hús sum Vaskaríið til at lúka tey bruna- og tryggleikakrøv, sum sett verða húsum, ið skula hýsa nógvum fólkum í góðum lag og nakað væl aftrat?

### Yvirtaka hús og hallir

Mentamálanevndin hevur í farna ári eisini havt til viðgerðar eina rúgvu av umsóknum frá frítíðarfeløgum um fíggjarliga hjálp at halda teirra hús gangandi, tí tey megna ikki raksturin.

Summi hava heitt á kommununa um at yvirtaka húsini heilt, meðan feløgini sjálvi ætla sær at halda fram at brúka tey eins og higartil.

Her er ikki gott at gera við. Eitt sjónarmið er, at skal kommunan gjalda bæði umvælingar og rakstur, so skal hon eisini valda.

Ein annar spurningur er: hvar endar kommunukassin tann dagin, ein stórur partur av teimum sjálvbodnu feløgunum í kommununi liggja í honum og á tann hátt sleppa undan sjálvi at taka tøkini?

Hetta eru dømi um mál, sum stinga seg upp í mentamálanevndini, men har tykist torført at koma til niðurstøðu.

Vit skula sjálvandi taka støðu út frá sjónarmiðum um, hvat tænir heildini best. Í hesum sambandi er stórur saknur í eini yvirskipaðari kós í mentanarpolitikkinum hjá Tórshavnar Kommunu.

So sum er tykir mær, at mentanarpolitikkurin er nakað tilvildarligur. Stundum kann hann eisini bera brá av at vera bæði alibipolitikkur og útgjaringarpolitikkur í senn.

# Við sjeytummaseymi ímóti fullveldi?

**Jákup Fróði Djurhuus**



Teir gjørdu ein 4 ára langan fullveldistúr kring oyggjarnar við Westward Ho og eru endaðir aftur inni í Hoyvíkini ímillum jólatrøini.

Síðani er leiðin løgd um hav niður í danska fólkatingið. Og ímeðan formansskapurin í fólkatinginum leitar teimum eftir hølum, leita teir sjálvir eftir skandalum rundanum oyrasund og bústaðirnar har á leið. Men higartil uttan hepna hond.

Jólini eru av, og løgtingsval er í hondum. Tað merkir sjónleik, og tað merkir tíðindaskriv.

Fogh kom til Føroya og fortaldi tað, sum hvør vanligur borgari hevur vitað síðani heimastýrislógin bleiv sett í gildi. At tit yvirtaka sum tit vilja.

Men knappliga bleiv hetta til eitt serligt frambrot og til nakað spildurnýtt. Ja, til sjeymílaferð ímóti fullveldi.

Fólk eru móð og troytt av hesum møsninum. Og tey óskrivaðu bløðini í politikki, sum skuldi vera so trúverdug og so seriøs, endaðu ímillum tey minst seriøsu og minst trúverdugu eftir bert einum einstøkum valskeiði á løgtingsbonkunum Nú er tað so enn einaferð sligið fast við sjeytummaseymi. Ferðin er okkara. Um hon so verður stýrd av fáfongd ella av stórlæti.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




# Føroyar til sølu

**Bill Justinussen**
*form. Miðfloksins*



### EINskiljingar

EINskiljingar er eitt av rakstrarrópum Fólkafloksins, nú rakstur skal fáast á grindina til 30. apríl. Hetta orðið, sum er fult í samljóði við tráan Fólkafloksins at avreiða ognir Føroya fólks til nakrar EINstaklingar, tykist tíverri eisini at vera sera EINoygt. Tað finst í hugaheimi Fólkafloksins bert EIN máti at skipa samfelagið, og tað er at avreiða og møguliga eisini avoyða alt alment virksemi. Fult í trá við eftirhondini avoldaðu Breckmann-ideologiina um eitt frítt og frælst kapitalistiskt samfelag, har sterk og veik sjálvi mugu smíða lagnuna sum best ber til. Í kommunistisku londunum vóru fólk svong og liðu undir harðrenda stýrinum og í kapitalistisku londunum eru mong eisini svong og líða undir harðrenda kapitalinum. Norðurlondini, sum eru skipað eftir einum munandi skilabetri leisti, hava ásannað, at frægasti háttur er eitt sindur av hvørjum, tvs. bæði almennar og privatar fyritøkur hond í hond til besta gagn fyri land og fólk.

### Góðar almennar fyritøkur

Og í Føroyum man neyvan nakar vera í iva um, at almennu fyritøkurnar hava verið ein týðandi liður í at lyfta samfelag okkara uppaftur úr díkinum. Føroya Banki er ein gullhøna, sum hvørt ár verpur gullegg í landskassan. Atlantic Airways hevur sum alment felag trýst ferðaseðlaprísirnar niður í eina helvt í mun til einkarrættarstøðuna frammanundan til miklan frama fyri allar føroyingar. Føroya Fiskavirking hevur sum koncern verið við til at lyft fiskaprísirnar har upp, sum ongin tordi at droyma um fyri 10 árum síðani til størsta gagn fyri sjómenn okkara. Í dag eru fiskimenninir teir, sum hála tær størstu inntøkurnar inn, og tað veri teimum øllum sera væl unt. Føroya Tele er framvegis so ella so alment, og harvið ein trygd fyri framhaldandi telesamskifti hjá útoyggjunum og smábygdunum, sum helst verða við sviðið soð, um felagið verður gjørt fult privat.

Hví tað er so umráðandi at einskilja hesar fyritøkur og aðrar við, kunnu vit bara gita um. Men at siga, at allir føroyingar fara at fáa fullan valuta fyri brandskattingina, svøvnleysu næturnar og gráu hárini frá fyrst í 90'unum er tokutala. Um tað loysir seg hjá einstaklingum at keypa hesar almennu ognir, loysir tað seg eisini hjá landinum framhaldandi at eiga tær.

### Kapitalurin

Tíverri hevur alt, sum eitur kapitalur, lyndi til at rotta seg saman eftir devisuni "If you can't beat them, then join them". Og hvør veit; verður Føroya Banki einskildur, kann tað so væl henda, at tað um nøkur fá ár bert verður ein peningastovnur í Føroyum. Og um Atlantic Airways verður einskilt, kann tað væl henda, at tað um nøkur fá ár bert verður eitt flogfelag. Og um Føroya Tele verður avhendað, kann tað væl henda, at lagt verður saman við Kall.fo. Og soleiðis kunnu vit halda fram. Kapitalurin hevur onki hjarta og bert eitt endamál: at vaksa og eta og vaksa enn meiri.

### Miðflokkurin á varðhaldi

Miðflokkurin kennir uppgávu sína at vera á varðhaldi og verja móti øllum ágangi. Í hesum føri kann skjótt henda, at myndugleikarnir koma at gera seg inn á palleba, og tí vilja vit fylgja hesum málinum neyvt.

# Føroyar, Fogh og framtíðin

**Bjarni Djurholm**
*løgtingsmaður*



Vit hava í fýra ár verið í ringrás, har vit nú endaðu aftur í politiska upphavinum. Vit byrjaðu í heimastýrinum, og endaðu við … heimastýrinum - nú skírt sum 7míla fet móti fullveldinum.

Nú Fogh var í Føroyum, eru øll samd um, at viðurskiftini Føroya og Danmarkar millum eru batnað munandi.

Í kóri hava flokkar játtað felags yvirlýsingina, har staðfest varð 14. januar, at: "Regeringen er indstillet på at samarbejde om Landsstyrets ønsker om overtagelser af yderligere sagsområder inden for grundloven og rigsenhedens rammer".

Líta vit aftur um bak, er tað undrunarsamt, hvussu politisku veingirnir nú hálova ætlaða samstarvið við danir. Meðan sambandsflokkurin setti føtur í spenni fyri øllum skilagóðum og sjálvsøgdum broytingum í ríkisrættarligu støðuni (var eisini garanturin til trilkanina um sjálvstýrisveingin í 98), so hevur tjóðveldisflokkurin áhaldandi dyrkað munirnar og ósemjurnar at náa málinum um ruðuleika og plássi í søgubókunum - ja, fyri at røkka republikkini skuldi ikki bakkast eina tumma, varð sagt.

Fjøldin, sum farnu árini hevur viljað skilagóðar broytingar í ríkisrættarligu viðurskiftunum, man nú við undran fylgja politisku gongdini. Ikki minst tá teir víðgongdu í ráksnúni nú bíta høvdið av givnum lyftum og prolkamatiónum, man tað mala fyri teimum flestu. Serliga fløkjsaligt man vera í fjølmiðlunum, haðani vit hava sæð lítið til avdúkandi tíðindaflutning. Har hevur løtumyndin verið karmurin, meðan politiski atburðurin og manifestatiónir farnu árini ikki hava havt stóran áhuga. Hinvegin tykjast miðlarnir at stimbra kollektiva óminnið, so at politisku veingirnir kundu sleppa snikkaleysir undan teirri skomm, sum teir í veruleikanum hava komið sær útí.

### Rættvís og órættvís

Miðskeiðis í 2000 var øllum greitt, at sáttmáli Føroyar og Danmarkar millum við 4 ára skiftistíð hvørki átti parlamentariskan meiriluta ella stuðul millum manna. Tí var sjálvsagt neyðugt at laga samráðingaruppleggið til veruleikan. Undirritaði skjeyt tá upp, at processin varð vend á høvdið. Raðfylgjan í tilgongdini kundi jú ikki vera avgerandi fyri málsetningin. Tí var sjálvsagt, at samantvinnanin av suvereniteti og skiftistíð varð liðað sundur og landsstýrið so miðjaði eftir at gera sáttmála á hesum grundarlagi. Útspælið var illa móttikið - ja, av teimum víðgongdu skýrt illoyalt móti setninginum, sum, sambært teir, var skilnaður millum rangt og rætt, millum rættvís og órættvís.

Kundi verið áhugavert at frætt, hví somu nú hálova og skýra felags yvirlýsingina sum ein sigur, tá lýsingin kann javnmetast við uppskotið um at venda tilgongdini á høvdið, samstundis sum hálovanin kann javnmetast við játtan av heimastýrisskipanini?

### Ringrás

Nú er skeiðið skjótt at enda komið, og vit kunnu eftirmeta úrslitini samanborið við nýttu orkuna og allar manifestatiónirnar farnu árini. Vit byrjaðu í heimastýrinum og endaðu við … heimastýrinum.

Tað løgna er tó, at henda skipanin, sum varð skýrd at vera orsøkin til ábyrgdarloysi, nú verður allýst sum karmurin um "7-míla fet móti fullveldinum"?! Soleiðis verður sannleikin tillagaður út_valda málinum. Veruleikin fær eina snaring, sum hóskar til umstøðurnar og miðlarnir presentera nýggja "sannleikan" sum ein sigur.

Samanumtikið hava vit verið í eini ringrás, har vit nú endaðu aftur í politiska upphavinum. Í fyrstu atløgu kann úrslitið tí tykjast soltið, men veruleikin er øðrvísi, tí hóast alt, so hava vit fingið avklárað hugburðin hjá dønum til sjálvstýrisynskið. Eisini hava vit fingið váttan fyri, at borgarliga stjórnin hevur meira pragmatiskan hugburð í ríkisrættarliga spurninginum, enn undanfarna. Og ikki minst, at avgerðin um framtíðar støðu okkara skal takast her, og at vit kunnu liða sundur samantvinnanina av skiftistíð og suvereniteti.

Í føroyska politiska umhvørvinum eru eisini avdúkingar, hóast lítið nýtt er komið undan kavi. Sambandsflokkurin er, tá samanum kemur, framvegis hin sami - kann kanska gera broytingar, men… og tjóðveldisflokkurin hevur funnið fram gamla slagaran um loysingina, sum nú skal vera í næsta valskeiði.

So samanlagt er alt við tað gamla, tó við ásannanini, at tjóðskaparliga verða tað tær hóvligu politisku áskoðarnirnar, sum fara at greiða framtíðarstøðu Føroya.

# Ein spurningur um samstarvsvilja

**Helgi Abrahamsen**



Eingin vildi síggja Nyrup og øll vóru samd við Fogh, hóast báðir søgdu tað sama.

Tá Poul Nyrup Rasmussen í 1998 var á vitjan í Føroyum, hevði hann eitt ynski um at hitta allar løgtingsmenn. Men meira enn helvtin av táverandi tingmonnum noktaðu fyri at koma á fund við forsætismálaráðharran.

Tá Anders Fogh Rasmussen í farnu viku vitjaði í Føroyum, ynskti hann at hava ein fund við Sambandsflokkin. Men nú vóru aðrir tingmenn misnøgdir, tí at forsætismálaráðharrin ikki eisini vildi hava fund við teir, og tí varð skráin broytt.

Føroyapolitikkurin hjá Fogh byggir á somu fólkatingssamtykt sum Føroyapolitikkurin hjá Nyrup bygdi á. Har er einki broytt. Men hví vilja føroyskir politikarar so fegnir hitta Fogh og ikki Nyrup?

### Samstarvsvilji heldur enn orð

Hetta vísir enn einaferð, at tá talan er um ríkisfelagsskapin, so er spurningurin ikki, hvat stendur á ymiskum pappírum. Spurningurin er heldur, um vit hava vilja til at samstarva um tað, sum pappírið sigur.

Sjálvur havi eg í onkrari blaðgrein samanborið hetta við eitt hjúnarlag. Tað kann vera líkamikið, hvussu væl vígslubrævið er orðað, um ikki samstarvsvilji er ímillum hjúnini.

Í fýra ár hevur landsstýrið nýtt alla orku til at lýsa fyri Føroya fólki, hvussu tvørligt tað er at vera í ríkisfelagsskapi við Danmark. Bæði hvítar og svartar bøkur eru skrivaðar um hetta evni, faldari er sendur í hvørt hús í landinum o.s.fr. Boðskapurin var alla tíðina greiður. Har bar einki til.

Á hinari síðuni vísti Nyrup ein mangan óhøviskan og lítið semjusøkjandi atburð.

Men uttan at broyta ein einasta bókstav í viðurskiftunum landana millum, so ber nú knapliga alt til. Ja teir mest víðgongdu loysingarmenninir hava verið noyddir at lata seg í 7-míla styvlarnar, fyri at klára at fylgja við gongdini.

### Nýskipanaruppskot Sambandsfloksins er gongda leiðin

Sambandsflokkurin gjørdi í 1999 eitt uppskot um nýskipan av viðurskiftunum millum Føroyar og Danmark. Hetta uppskot vísir á møguleikar fyri frílyntari og hollari menning av Føroya fólki bæði stjórnarliga og fíggjarliga. Tað vísir á einar meira sjálvbjargnar Føroyar, á menning og varðveiðslu av vælferðarsamfelagnum, og á fjølbroyttar møguleikar í altjóða høpi.

Alt hetta, sum ein uppsteðgað fullveldisætlan ikki hevur megnað eftir 4 árum, letur seg væl gera, um vit verða verandi í ríkisfelagsskapinum. – Men tað krevur samstarvsvilja.

Fogh er komin í sessin hjá Nyrup, og tað merkist longu væl. Nú manglar bara at skifta fullveldislandsstýrið í Føroyum út við eitt meira semjusøkjandi landsstýri. Tað eiga vit at gera á løgtingsvalinum í apríl.